TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Endurnýtsluplássið

á Hjalla er nýggj tænasta til borgarar í Tórshavnar kommunu. Her ber til at lata inn alt burturkast, ið ikki verður heintað við bústaðin.

Á plássinum eru bingjur til tað skilda burtukastið. Tú kanst koyra inn á plássið við bili. Gjølla er merkt upp, so lætt er at finna røttu bingjuna. Tú kanst stilla bilin við hvørja einstaka bingju og avskipa.

Á plássinum verður burturkastið skrásett á telduskipan.

Endurnýtsluplássið letur upp 1. januar 2004, og er hetta ein partur av størri umhvørivsátaki hjá Tórshavnar kommunu.

www.torshavn.fo

Formaður til endurnýtsluplássið á Hjalla

Tórshavnar kommuna søkir eftir formanni til nýggja endurnýtsluplássið á Hjalla.

Formaðurin skal
- skipa fyri dagliga virkseminum á endurnýtsluplássinum á Hjalla.
- tryggja at plássið verður rikið eftir galdandi reglum og lýkur góðkenningarnar innan umhvørvi og starvsfólkaviðurskifti.
- vegleiða starvsfólk, stovnar og viðskiftafólk um rætta burturkastviðgerð.

Býráðið roknar við at tú
- hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir innan økið, umsiting og leiðslu, umframt at vera til reiðar at taka neyðug skeið innan økið.
- hevur grundleggjandi teldukunnleika.
- dugir føroyskt og danskt, bæði í skrift og talu.
- hevur koyrikort, møguliga eisini stóra koyrikortið.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sum skjótast sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Jákup Nielsen, leiðara á Brennistøðini á Hjalla tlf. 317582, e-mail jakupan@torshavn.fo ella Marius Müller, tekniska stjóra, á telefon 315160 e-mail, marius@torshavn.fo.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. november 2003. Viðmerk brævbjálvan "formaður á Endurnýtsluplássinum.

Kom og steðga vónloysinum

Vit kunnu øll ávirka teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av, at fólk verða fongslað av órøttum, pínd ella avrættað. Tú kanst gera tað við at fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. Teknar tú teg til átakið, fært tú trý brøv um mánaðin, sum tú kanst senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin.

Tess fleiri, ið gera vart við órættvisi kring heimin, tess betur ber til at ávirka tey, ið hava ábyrgdina. Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo

HESTPRENT

BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3621, Sp/f Havna-Grillin, 370 Miðvágur.
Viðtøkur broyttar: 15.10.2003.
Nýtt hjánavn: Sp/f Resturant Samara (Sp/f Havna-Grillin)
Kapitalur: Hækking við kr. 140.000,00 til kr. 220.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 140.000,00 í øðrum viðrum til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 28. oktober 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 349, P/F Esmar Simonsen, 530 Fuglafjørður.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Elisabeth Ditleifsd. Eldevig Olsen, Norður í Bø 7, 530 Fuglafjørður.
Innkomin sum stjóri: Martin Simonsen, í Brekkum 4, 530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya tann 28. oktober 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3668
Navn: Sp/f Neshamar
Adressa: 740 Hvannasund.
Kommuna: Hvannasunds Kommuna
Stovningardato: 20.10.2003
Viðtøkudato: 20.10.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00 Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Elmar Simonsen, 740 Hvannasund.
Stjórn: Elmar Simonsen, 740 Hvannasund.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Føroyabók, Vágstún, Box 144, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 20.10.2003 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 28. oktober 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2976, Sp/f FíJo, 700 Klaksvík.
Viðtøkur broyttar: 19.12.2003.
Kapitalur: Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 180.000,00 Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 28. oktober 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2664, Sp/f Lido Seafood, 220 Skálavík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Sólrun Kristiensen, Reynsgøta 31, 160 Argir.
Innkomin sum stjóri: Linjohn Christiansen, 220 Skálavík.

Skráseting Føroya tann 28. oktober 2003

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Brúktir borivognar til sølu

Við hesum verða hesir borivognar lýstir til sølu:

1. stk. Atlas Copco Roc 410 árg. 1986
1. stk. Atlas Copco Roc 512 árg. 1987

Boðini uppá borivognarnar skulu verða í afturlatnum brævbjálva, og skulu vera Landsverkfrøðinginum í hendi í seinasta lagi 10. november 2003.

Landsverkfrøðingurin tekur sær rætt til at velja ímillum innkomnu boðini, ella einki at taka.

Nærri fæst at vita frá Jóan Petur Patursson, deildarleiðara, á tlf. 422420.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Nesi hagi

verður seldur til haruskjóting fríggjadagin 31. oktober kl. 19.00 í seyðahúsinum hjá Jógvan E. Davidsen, Æðuvík.

Hagastýrið

Randarhús í Hoyvík til sølu

Niðara hæddin er 70 m² við stovu, køki, grovkøki, wc, gongd, trappurúmi og duri.
Á ovaru hæddini er hjúnarúm, 3 kømur, baðirúm og gongd, ístalt uml. 50 m². Ovastaloftið kann innrættast. Harumframt er bilhús, úthús og hjallur. Garður er um ognina.
Grundøkið er 200 m² og liggur Millum Gilja 41, Hoyvík í barnavinarligum umhvørvi.

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelag@post.olivant.fo

Tormóður Djurhuus, adv.
Petur Even Djurhuus, adv.
Ingi Højgaard, adv
Jógvan Páll Lassen, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv.

Bilur við skaða til sølu!

Fyri P/F Trygd selja vit ein Opel Corsa 1.4 Sport við skaða.

Bilurin hevur 3 hurðar, hevur koyrt 83.500 km, er frá sept. 1995 og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur.

P/F Reyni Service
Bilasølan
Tlf. 353040

Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruplass leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakalæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakalæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

Bakaríið hjá Gunleivi
Tlf. 228838 ella 312161

Ergoterapeutur/ Fysioterapeutur til Hjálpartóla-miðstøðina (HTM)

(Endurlýsing)

Á HTM er eitt avloysararastarv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur fyri starvfólk í barsilsfarloyvi leyst at seta beinanvegin.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 13 fólk á HTM.

Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði er ein fyrimunur
- góð samstarvsevnir
- telduførleika á brúkarastøði

Vit kunnu bjóða:
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og viðmerking um hvørt av starvinum søkt verður um skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 18. nov. 2003 kl. 14.00.

Boðað verður til

eykaaðalfund og kjakfund

leygardagin 15. november kl. 10.00
í hølum felagsins Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn

Uppskot til kjakfundin skulu vera skrivstovu felagsins skrivliga í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. november.

Føroya Arbeiðarafelag

Háskúlaskeiðið
frá 6. januar til síðst í juni **2004**

fjølbroytt undirvísing, avbjóðingar og upplivingar

Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar

Føroya Fólkaháskúli
Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn - tlf. 31 17 43
ffh@skulin.fo - www.skulin.fo/ffh